Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	05.03.2021
Mál nr.:	21/00027
Málsviðgjørt:	AE
Eftirkannað:	23.februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg
um
Búskaparráð

§ 1. Búskaparráðið fylgir við búskaparligum viðurskiftum í landinum og kemur við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina.

§ 2. Landsbankanevndin, sbr. § 2 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, er Búskaparráðið.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nevndarsamsýningarnar.

§ 3. Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.
Stk. 2. Búskaparráðið kann harumframt gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

§ 4. Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

§ 5. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrið hevur sett sær fyri at minka talið av nevndum og ráðum, og at rationalisera almennu fyrisitingina.

Fíggjarmálaráðið endurskoðar ráð og nevndir sínar, fyri at minka og avtaka nakrar teirra. Til dømis er Fíggingargrunnurin í løtuni undir avtøku. Ætlanin er eisini at avtaka aðrar nevndir og ráð.

Landsstýrismaðurin mælir til, at landsbankanevndin verður Búskaparráðið og at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna, og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

Nú landsbankanevndin eisini verður Búskaparráð, minkar fyrisitingin við einum ráði. Tvær nevndir við tilsamans 10 nevndarlimum, verður til eina nevnd við 5 nevndarlimum.

Fróðskaparsetrið røkir dagligu umsitingina og skrivarauppgávuna hjá Búskaparráðnum. Nú umsitingin og skrivarauppgávan verður flutt til Landsbankan at røkja, ber til at rationalisera fyrisitingina, og sakkunnleikin verður savnaður á einum stað.

1.2. Galdandi lóggáva
Búskaparráðið varð upprunaliga stovnað í 1962. Búskaparráðið virkar í dag eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð.

Uppgáva ráðsins er at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, men kann eisini gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

Konjunkturfrágreiðingarnar hava stóran týdning í sambandi við arbeiðið hjá landsstýrinum og Løgtinginum við játtanarkørmum um várið og við fíggjarlóg um heystið.

Búskaparráðið hevur 3 limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Limirnir skulu verða búskaparfrøðingar. Valskeiðið hjá Búskaparráðnum er 4 ár.

Froðskaparsetrið hevur umsiting og skrivstovuhald ráðsins.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at savna sakkunnleika og fyrisiting innan búskaparmál og at lækka talið av nevndum. Nú landsbankanevndin eisini verður Búskaparráð, minkar fyrisitingin við einum ráði.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Meginbroytingin í mun til verandi lóggávu er, at landsbankanevndin verður Búskaparráðið, at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum. Landsbankin fær hetta virkisøkið aftrat verandi uppgávum.

Tað verður eisini ásett í lógini, at landsstýrismaðurin ásetur nevndarsamsýningarnar.

Limirnir í Búskaparráðnum og nevndarlimirnir í landsbankanevndini verða teir somu.

Landsbankanevndin verður vald á sama hátt, sum Búskaparráðið higartil er valt, har landsstýrismaðurin setir Búskaparráðið eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Tó soleiðis at landsbankanevndin/ Búskaparráðið hevur 5 limir, har í minsta lagi 3 skulu verða búskaparfrøðingar, og verður nevndin vald í eitt 3 ára tíðarskeið. Landsstýrismaðurin velur formannin.

Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya skal tilmæla í minsta lagi 10 limir til Búskaparráðið, av hesum 5 kvinnur og 5 menn. Um limur fer úr Búskaparráðnum í valskeiðnum, kann landsstýrismaðurin velja at ein at teimum fyrst tilmæltu limunum, ella biðja Stýrið fyri Fróðskaparsetrið um nýtt tilmæli.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið um Búskaparráð, hevur verið til almenna hoyring og sent til viðkomandi stovnar, feløg og ráð, og hava hesi svarað: Fakfelagssamstarvið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Landsbankin, Búskaparráðið, BLF, Felagið Peningastovnar, Hagstova Føroya, Fróðskaparsetur Føroya og Kommunufelagið. Hoyringssvarið hjá Kommunufelagnum kom eftir seinastu freist, og er lagt við sum fylgiskjal.

Fiskimálaráðið, Heilsumálaráðið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið hava boðað frá, at tey ongar viðmerkingar hava til lógaruppskotið.

Hetta lógaruppskotið varð sent til hoyringar saman við lógaruppskotinum um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð. Í hoyringarsvarum hava viðkomandi aktørar ummælt lógaruppskotið um Landsbankan og lógaruppskotið um Búskaparráð undir einum, og fata lógaruppskotini at verða eina heild. Hoyringarsvarini verða tí tikin við í bæði lógaruppskotini.

Fakfelagssamstarvið
Fakfelagssamstarvið metir, at landsbankanevndin arbeiðir skynsamt og skjótt, og ivast í sparingunum, um landsbankanevndin eisini verður Búskaparráð, tí arbeiðsuppgávur nevndarinnar verða fleiri.

Galdandi lóg ásetur, at ein breiður skari av felagsskapum í samfelagnum tilnevna limir til nevnd landsbankans, at nevndin umboðar at kalla allar partar í samfelagnum, og hevur eina fakliga breidd.

Breiða umboðanin og nevndarvalið tryggjar, at Landsbankin kann virka sum ein óheftur og álítandi stovnur av týdningi fyri føroyska búskapin.

Fakfelagssamstarvið metir, at Búskaparráðið soleiðis, sum vit kenna tað í dag, verður avtikið við lógarbroytingunum, og at nevndarvalið í Landsbankanum merkir, at armslongdar meginreglan hvørvur. Stovnurin verður politiskt heftur, og umboðar ein smalan part av føroyska samfelagnum.

Fakfelagssamstarvið mælir frá, at løgtingslógin um Landsbanka Føroya verður broytt.

Búskapar – og Løgfrøðingafelag Føroya
BLF mælir frá at leggja Búskaparráðið og nevndina fyri Landsbankan saman og hevur millum annað hesar viðmerkingar til uppskotið:

Búskaparráðið verður mannað við búskaparfrøðingum, ið hava kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, fyri at tryggja fakligu førleikarnar hjá ráðnum. Eftir lógarbroytingina um Landsbankan, skulu limirnir í nevndini, sum eisini verður Búskaparráð, samanlagt hava førleikar á øllum hesum økjunum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum.

Tá tað bert verða tríggir limir í samantvinnaða Landsbanka- og Búskaparráðnum, og limirnir skulu hava nevndu førleikar er sannlíkt, at bert ein av limunum í ráðnum verður búskaparfrøðingur. Tað ber ikki til at varðveita neyðuga fakliga grundarlagið undir Búskaparráðnum og førleikunum at gera metingarnar, sum Búskaparráðið sambært § 1 í løgtingslóg um Búskaparráð er sett at gera.

Búskaparráðið skal koma við óheftari búskaparligari ráðgeving. Óheftnið hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum er millum annað tryggjað við, at limir í Búskaparráðnum og Landsbankanum
verða settir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum. BLF mælir til, at limirnir í óhefta Búskaparráðnum framhaldandi verða settir eftir tilmæli.

BLF metir ikki, at sparingin av samanleggingini stendur mát við førleikamissin, sum broytingin fer at elva til.

Búskaparráðið
Búskaparráðið skal koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskapin, og Landsbankin skal vera ein sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini.

Um Landsbankin verður ein almennur stovnur við rakstrarjáttan á fíggjarlógini, og nevndin verður beinleiðis tilnevnd av landsstýrismanninum, metir Búskaparráðið, at hvørki Landsbankin ella Búskaparráðið kunna virka óheft av politisku skipanini. Somuleiðis kann Føroya váðaráð, ið er undir Landsbanka Føroya, við landsbankastjóranum sum formanni, heldur ikki longur metast at vera óheftur myndugleiki.

Tað eigur eisini at vera ein treyt, at Búskaparráðið og landsbankanevndin verða mannað av limum, ið hava fakligar førleikar til at røkja uppgávurnar.

Samanumtikið tekur Búskaparráðið ikki undir við lógarbroytingunum, og at landsbankanevndin verður Búskaparráð. Hinvegin verður víst á, at Landsbankin og Búskaparráðið kunnu styrkja hvørt annað, um skrivstova Búskaparráðsins liggur í Landsbankanum, sum sjálvstøðugt arbeiðsøki, men einans um nóg nógv arbeiðsorka verður løgd í arbeiðsøkið.

Búskaparráðið er eisini nógv bundið at samstarvi við Hagstovu Føroya. Ein fíggjarlig styrking av arbeiðinum hjá Hagstovuni við búskaparhagtølum hevði styrkt alt arbeiðið við at gera metingar um búskapin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Arbeiðsgevarafelagið viðmerkir lógaruppskotini, men viðgerð eisini mál, sum hava óbeinleiðis við lógaruppskotini at gera.

Ein trupulleiki við búskaparligu ráðgevingini til landsstýrið er, at hagtalsgrundarlagið, sum ráðgevandi stovnarnir skulu grunda síni tilmæli á, ikki er nøktandi, og tað eigur landið at raðfesta. Áðrenn sparingar verða framdar eigur at verða greinað, hvørjar uppgávur stovnarnir skulu hava, og hvussu fyrisitingin skal skipast.

Vinnuhúsið ivast í, um tríggir nevndarlimir eru nóg mikið til at tryggja nóg fjøltáttaðar førleikar í nevndini, og at nevndin kann verða víðkað við einum ella tveimum limum í mun til lógaruppskotið. Mælt verður til at halda fast í verandi skipan, har ymiskir partar innstilla uppskot til nevndarlimir, sum landsstýrismaðurin kann velja millum. Tað, at raksturin av Landsbankanum verður fíggjaður av landskassanum, kann merkja, at stovnurin ikki virkar óheftur.

Vinnuhúsið mælir frá, at Landsbankin virkar sum fíggjarstovnur hjá kommunum og almennum. Til hetta er at viðmerkja, at tað verður strikað í lógaruppskotinum, so málið verður loyst.

Eftir uppskotinum verða gjaldføriskrøvini hjá landskassanum linkað, so landskassin frameftir í eitt tíðarskeið kann hava eitt gjaldføri á í minsta lagi 13% av BTÚ, í mun til eitt krav á 15% í dag. Tað undrar Arbeiðsgevarafelagið, at landið linkar kapitalkrøvini til sín sjálvs, samstundis sum politiska skipanin hevur sett óvanliga strong kapitalkrøv í verk fyri føroysku bankarnar.

Felagið Peningastovnar
Felagið tekur undir við ætlanini at miðsavna fakliga vitan og førleikar, soleiðis at stovnarnir frameftir fáa enn betri møguleika at gera eitt munagott arbeiði.

Hagstova Føroya
Hagstovan tekur ikki undir við lógaruppskotunum. Viðmerkingarnar hjá Hagstovuni eru millum annað hesar:

- Nevndin í Landsbankanum hevur serskildar og krevjandi uppgávur, ið eru so mikið ymiskar frá endamálinum hjá Búskaparráðnum, at talan ikki er um samanfall av uppgávum. Harumframt verða eftir ætlan ikki somu fakligu krøv sett til landsbankanevnd sum til verandi Búskaparráð.

- Búskaparráðið eigur at verða skipað sum higartil, men styrkt við 2 búskaparfrøðingum til skrivaratoymi, sum kann staðsetast í fakligum og greinandi umhvørvi, til dømis í Landsbankanum.

- Um tað bert verða 3 nevndarlimir í Landsbankanum, verður grundreglan um demokratiska umboðan slept, sum er ásett í galdandi lóg við tilmæli frá Setrinum, landsstýrismanni, kommunum, arbeiðsgevarum og fakfeløgum. Tað kunnu til dømis framhaldandi verða 7 nevndarlimir.

- Ásetingin um val av nevndarlimum í Landsbankanum, og at bankin verður fíggjaður við vanligari rakstrarjáttar á fíggjarlógini, ger hann minni óheftan. Hagstovan mælir til at varðveita skipanina við vali av limum í landsbankanevndina og at Landsbankin verður fíggjaður eins og galdandi lóg ásetir.

Fróðskaparsetur Føroya
Fróðskaparsetrið viðmerkir, at óheftnismeginreglan, sum liggur í, at landsstýrismaðurin velur Búskaparráðið eftir tilmæli frá óheftum stovni, Fróðskaparsetrinum, verður avtikin í og við, at landsbankanevndin eisini gerst Búskaparráð, og teir 5 av 7 limum í landsbankanevndini ikki longur skulu veljast eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum, Arbeiðsgevarafelagnum, fakfeløgunum og Kommunufelagnum.

Eftir uppskotinum til nýggja § 2, stk. 2, í lógini um Landsbankan og váðaráðið kunnu óheftir og uttanveltaðir stovnar gera tilmæli, men bara eftir áheitan frá landsstýrismanninum.

Eftir verandi lóg um Búskaparráð skulu búskaparráðslimirnir vera búskaparfrøðingar við kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, men verða ikki somu krøv við lógarbroytingini.

Um uppgávurnar hjá Búskaparráðnum skulu leggjast til Landsbankan, verður neyðugt at styrkja fyrisitingina, og seta fleiri starvsfólk, sum samanumtikið ikki merkir sparingar.

Landsbankin
Fyrimunir við at leggja stovnarnar saman kann verða at byggja upp eitt fakliga sterkt umhvørvi í sama stovni.

Vansarnir eru, at politiska óheftnið verður ógildað tí landsstýrismaðurin einsamallur velur teir 3 limirnar í nevndina sambært § 2, stk. 2 í lógaruppskotinum um Landsbankan, og Búskaparráðið og Landsbankin verða frameftir fíggjaðir beinleiðis við rakstrarjáttan hjá Fíggjarmálaráðnum. Lógargrundarlagið hjá Landsbankanum, ið tryggjar armslongd frá politisku skipanini, verður strikað.

Um broytingar verða framdar, eigur Landsbankin at varðveita sítt politiska óheftni við at nevndarlimirnir verða valdir eftir tilmæli frá stovnum/feløgum/hægri læristovni, sum frammanundan eru defineraði, og at talið av nevndarlimum verður 5.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar
Landsstýrismaðurin metir, at við at savna búskaparligan kunnleika hjá Landsbankanum og har landsbankanevndin verður Búskaparráð, verður fyrisitingin sameind, raðfest og styrkt.

Í lógaruppskotinum var ætlanin fyrst, at landsstýrismaðurin skuldi velja 3 limir í landsbankanevndina, eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Felagnum Peningastovnar, Búskapar- og løgfrøðingafelagnum, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, ella onnur sum landsstýrismaðurin heitti á, kundu koma við uppskotum til nevndarlimir.

Í hoyringarskrivunum verður funnist at, at talið av nevndarlimum verður lækkað ov nógv, soleiðis at hon umboðar ein ov smalan skara av fólki, at ikki nóg stór krøv verða sett til útbúgving hjá nevndarlimum, og at landsstýrismaðurin velur allar nevndarlimirnar sjálvur, soleiðis at óheftni ikki verður tryggjað.

Fíggjarmálaráðið hevur tikið hesar viðmerkingar frá hoyringarpørtunum til eftirtektar, og broytt lógaruppskotið soleiðis, at tað verða valdir 5 nevndarlimir, at í minsta lagi 3 limir skulu vera búskaparfrøðingar við kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, og at landsstýrismaðurin setir nevndina eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Harumframt verður eisini ásett, at nevndin eigur at hava kunnleika til føroyskt vinnulív.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Játtanin á fíggjarlógini til “3.15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarjáttan)” er 2,45 mió kr.

Búskaparráðið sjálvt kostar umleið 1,0 mió kr., av hesum eru 200 tús kr. til nevndarsamsýningar, meðan umleið 1,4 mió kr. verða brúktar til gransking og undirvísing í búskapi á Fróðskaparsetrinum.

Tær 1,4 mió kr. eiga at verða játtaðar beinleiðis til Fróðskaparsetrið.

Um dagliga umsitingin og skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum, verður flutt til Landsbankan at røkja, ber til at rationalisera fyrisitingina.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Búskaparráðið fylgir við búskaparligum viðurskiftum í landinum og kemur við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina.

Til § 2
Landsbankanevndin, sambært § 2 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, er Búskaparráðið.

Limirnir í Búskaparráðnum, og nevndarlimirnir í landsbankanevndini verða teir somu.

Búskaparráðið hevur nú 3 limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Limirnir skulu verða búskaparfrøðingar. Valskeiðið hjá Búskaparráðnum er 4 ár.

Landsbankanevndin verður vald á sama hátt, sum Búskaparráðið higartil hevur verið valt, har landsstýrismaðurin setir Búskaparráðið eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Tó soleiðis at landsbankanevndin/ Búskaparráðið hevur 5 limir, har í minsta lagi 3 skulu verða búskaparfrøðingar, og verður nevndin vald í eitt 3 ára tíðarskeið. Landsstýrismaðurin velur formannin.

Tað merkir at Búskaparráðið verður styrkt við 2 limum.

Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya skal tilmæla í minsta lagi 10 limir til Búskaparráðið, av hesum 5 kvinnur og 5 menn. Um limur fer úr Búskaparráðnum í valskeiðinum, kann landsstýrismaðurin velja at ein at teimum fyrst tilmæltu limunum, ella biðja Stýrið fyri Fróðskaparsetrið um nýtt tilmæli.

Verandi limir í Búskaparráðnum sita inntil Búskaparráðið er valt av nýggjum. Eftir ætlan stutt eftir at lógarbroytingin er sett í gildi.

Landsstýrismaðurin ásetur nevndarsamsýningarnar.

Til § 3
Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september. Búskaparráðið kann harumframt gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum. Her er onkin broyting í mun til galdandi lóggávu.

Til § 4
Landsbankin skal røkja skrivarauppgávuna og hava dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum, sum sostatt verður flutt frá Fróðskaparsetrinum.

Við at savna búskaparligan kunnleika hjá Landsbankanum, har fyrisitingin av Landsbankanum og Búskaparráðnum eru á sama stovni, og har landsbankanevndin verður Búskaparráð, verður fyrisitingin sameind, raðfest og styrkt.

Til § 5
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 74 frá 20. mai 1996 um Búskaparráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 20. desember 2012.

Fíggjarmálaráðið, 05. mars 2021

Jørgen Niclassen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Landsbankanum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Búskaparráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá BLF
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Felagnum Peningastovnar
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Hagstovu Føroya
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Fróðskaparsetur Føroya
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Umhvørvis-og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum